# rstøðin fyllir 70



*Í 1975 vóru studentarnir 80 í tali. Tað var rættuliga høgt tal tá í tíðini. Nú er pisutalið fleiri ferðir so stórt á hvørjum sumri*

úr Gásadali og til Viðareiðis. Hvør hevði roknað við tí í 1975.

## Ikki altíð sum prestur prædikar

Hvat lærdu vit so í Hoydølum, og hava vit fingið nakra nyttu burturúr tí?

Nú sóla vit okkum í gomlum minnum. Tað hevði kanska verið læruríkt at kanna, hvussu vit upplivdu tíðina í Hoydølum, hvussu vit hava upplivað at hittast aftur tær ferðirnar, tá ið árgangurin hevur verið saman (seinast fyri tveimum árum síðani, tá ið tredivu ár vóru liðin, síðani vit vóru liðug) og kanska eisini, hvussu vit fortelja øðrum um okkum sjálvi. Hvat hevur týdning, og hvat hevur minni týdning, tá ið vit eftir so mong ár hittast aftur. Hvussu gekk við ætlanum og dreymum. Hvussu hava vit megnað at takla, at lívið sjáldan ella kanska ongantíð tók seg soleiðis upp, sum vit høvdu vónað og ætlað. Og hvar er skúlin í øllum hesum? Hevur tíðin í studentaskúlanum havt nakran týdning fyri, at vit mentust til tey individini, sum vit nú eina ferð eru?

Í Gladsaxe kommunu gjørdu tey fyri tveimum árum síðani av, at tey skuldu kanna júst hesar spurningar. Tey, sum vóru liðug í studentaskúlanum í 1980, og sum fyri tveimum árum síðani savnaðust fyri at halda 25 ára jubileum, skuldu á spurnarblaði svara, og so var ætlanin at rógva aftur á aftur við kvalitativum samrøðum við næmingar í einum málsligum og einum matematiskum flokki.

Tað hevði verið áhugavert at gjørt sovorna kanning av okkara árgangi. Honum sum var liðugur í 1975.

Vit eru ivaleyst samd um, at privatlívið, útbúgvingin og starvsleiðin ofta ikki lagaðu seg soleiðis, sum vit høvdu roknað við og ætlað. Tiltikin er søgan um unga mannin, sum við húgvu á høvdinum fór niður, tí hann ætlaði at gerast sakførari. Hann las jura í ein dag, og so kom hann upp aftur við prógvi sum froskmaður!

Í okkara flokki vóru vit 21 – 20 dreingir og so Sólfríða, sum óføra væl kláraði at vera einsamøll genta millum so nógvar dreingir. Onkra ferðina heitti Erik á hana um at fara út um, meðan hann fortaldi onkra søgu. Tað segði hon nei til, og tað var so tað.

## Lívið lærir

At studentsprógvið endiliga skal bera víðari útbúgving við sær er ikki nøkur sjálvfylgja. Tað verður í endamálsorðingini undirstrikað, at talan er um útbúgving, sum hevur tvey endamál – at kvalifisera til víðari útbúgving og so almenn útbúgving, sum millum annað kvalifiserar til arbeiðsmarknaðin.

Øll 21 í okkara flokki hava nomið sær útbúgving eftir tíðina í Hoydølum. Leysliga mett hevur meiri enn helmingurin verið uttanlands og lært, og tað kann gott vera, at tveir ella rgíggin nú búgva uttanlands, meðan øll hini búgva í Føroyum:

*Tit eru jú Føroya álit í dag*
*tí missið ei fótafestið,*
*til andalig skrobbein sum*
*geykaungar,*
*á flatlondum verða teir flestu.*

Segði Poul F. Vit eru mong, sum hava livað nøkur av bestu árum okkara uttanlands. Eg búði níggju ár í Keypmannahavn. Leingi hevði eg hetta sum mátisnór, tá ið eg hugsaði, hvussu tíðin rann. So hevði eg verið eins leingi í Føroyum aftur, sum eg hevði búð niðri, og nú er lutfallið soleiðis, at tað eru meiri enn tvífalt so nógv ár runnin síðani heimkomuna, sum tíðin í Danmarki var.

Nú eru tað ikki vit, sum kunnu verða geykaungar á flatlondum. Heldur eru tað børn okkara, sum nema sær útbúgving í Danmark. Uttan mun til globaliseringina so er tað ivaleyst ynskið og dreymurin hjá okkum øllum, at okkara børn saman við teirra børnum um ikki so mong ár skulu venda aftur henda vegin og gleða okkum, sum nú eru ella nærkast abba og ommu ættarliðnum.

Men hvat lærdu vit so í Hoydølum?

Tað eru so nógv svar til spurningin, sum vit vóru næmingar. Fyri tíggju árum síðani var eitt av stílaevnunum í donskum studentaskúlanum í Danmark knýtt at broti úr endurminningunum hjá Stefan Zweig – Verden af i går. Uppgávuorðingin í hesum sambandi var Hvad karaktiserer den gymnasieungdom, som Stefan Zweig skildrer i sin selvbiografi. Diskuter ligheder og forskelle mellem Stefan Zweigs genaration og din egen.

Meiri enn helmingurin av næmingunum í Danmark skrivaði um hetta evnið. Tað vil siga, at fleiri enn tíggju túsund næmingar lýstu teirra egnu studentaskúlatíð. Aftan á varð tað mett at vera áhugavert at nýta stílarnar sum granskingartilfar, og tað er sipað til hetta granskingararbeiðið í bókini frá Kierkegaard og til Calvin Klein.

Í flestu førum er lýsingin positiv. Ein næmingur sigur soleiðis:

Da jeg forlod folkeskolen vidste jeg, at jeg havde lært alt, hvad jeg havde brug for på det stadie, og var klar over, at det var tid til at komme videre. Jeg kedede mig afsindigt i skolen, men til gengæld læste jeg hver eneste bog, jeg kunne få fingre i. Det er en følelse, jeg ikke har her ved gymnasiets afslutning. Jeg ved, jeg endnu kunne lære mange værdifulde ting, og jeg har ikke lyst til at afslutte min gymnasietid, for jeg føler mig stadig som en lærling, der ikke er parat til at forlade sin mester endnu.... At opdage verden er en proces, der tager hele livet.

Tað kann gott vera, at tað í dag eru dømi um næmingar, sum fara í studentaskúla ella fara undir aðra miðnámsútbúgving, tí teir ikki vita, hvat teir annars skulu taka sær til. Teir útseta valið á arbeiðsmarknaðinum ella teir fara í skúla, tí teir hava ikki funnið læruupláss. Men eg eigi dømi um stak nógvar næmingar, sum eru miðvísir og vita, hvat skal til, um teir skulu røkka møguleikanum at